MVH P/F | Á HJALLA 15 | TELEFON 363800

MVH
MASKINVERKSTAÐURIN Á HJALLA

# VERKFØRARI TIL MVH

Verkførari okkara á maskinverkstaðnum á Hjalla ynskir at royna nýggjar avbjóðingar. Tí verður sókt eftir nýggjum verkførara til maskinverkstaðið.

**Arbeiðsøkið**
Sum verkførari hevur tú ábyrgdina av at tilrættaleggja arbeiðið á maskinverkstaðnum. Ein onnur týðandi uppgáva er at samskifta við viðskiftafólk, veitarar og goymslustarvsfólk. Eisini hevur tú ábyrgdina av, at arbeiðs-og papírsgongdin er so skjót og smidlig sum tilber.
Í løtuni eru 6 starvsfólk á verkstaðnum.

**Tín førleiki**
Vit søknast eftir einum persóni við útbúgving og royndum innan maskinøkið. Hevur tú, umframt hendan førleika, vunnið tær annan ástøðiligan førleika, sum t.d. maskinmeistaraútbúgving ella líknandi, er tað ein fyrimunur.

Tað er umráðandi, at tað fellur tær lætt at samskifta við viðurskiftafólk og starvsfólk, og at tú ert fyrikomandi.

**Løn**
Lønin verður ásett sambært nærri avtalu.

Hevur tú áhuga í hesum starvi, er tú vælkomin at ringja til Klæmint Weihe, á 216644 ella senda teldupost til kw@mvh.fo

**UM OKKUM**
MVH er nýstovnað felag, sum hevur til endamáls at umboða stórar og kendar fyritøkur innan entreprenørmaskinur m.a. Komatzu og Hydrema og Volvo bussar og lastbilar umframt at reka eitt dygdargott verkstað.
Vit hava sett okkum sum mál at gerast førandi innan verkstaðstøkni til vinnuna bæði á sjógvi og landi. Fyri at náa hesum endamáli, er neyðugt við dugnaligum starvsfólki og góðum hølisviðurskiftum. Tað er tí avgerð tikin um, at byggja nýtt verkstað á Hjalla, soleiðis at fyritøkan eisini kann verða savnað á einum stað seinni í summar.



# **Teknikari** til Føroya Shell

**Til okkara teknisku deild sóknast vit eftir einum teknikara at byrja sum skjótast.**

**Arbeiðsøki**
Arbeiðið umfatar viðlíkahald av tekniskari útgerð hjá Føroya Shell, alt frá útbúnaði á service støðum, til oljugoymslur og oljuútbúnað á tangabilum.

Harumframt kemur tú at vera ein týðandi partur av teknisku menningini av fyritøkuni, har tú ert við til at finna og implementera nýggjar loysnir, og vera við í ymiskum verkætlanum.

Føroya Shell hevur oljugoymslur bæði í Tórshavn og í Klaksvík, og er møguleiki fyri at hava heimstað á hesum báðum støðum, men roknast skal við, at neyðugt er at ferðast kring alt landið har Føroya Shell hevur sítt virksemi.

**Førleikakrøv**
Vit vænta at tú hevur eina tekniska útbúgving sum t.d. maskinmeistari. Arbeiðið krevur kunnleika/áhuga til bæði mekanik, elektronik og el.

**Persónligir eginleikar**
Vit vænta at tú ert jaligur av lyndi og dámar væl avbjóðingar, sum krevja, at tú støðugt mást seta teg inn í nýggj viðurskifti. Umráðandi er eisini at kunna arbeiða sjálvstøðugt og hava áræði, sum tryggjar at dygdar loysnir verða funnar.

**Vit bjóða**
Kappingarføra løn, góða eftirlønarskipan, arbeiðsbil og annars góðar arbeiðsumstøður. Vit leggja dent á at hava eitt høgt tekniskt støði, sum er avgerandi fyri okkara kappingarføri. Tí er umráðandi við støðugari førleikamenning, sum vit stuðla deils gjøgnum team work, tøttum samstarvi við veitarar og skeiðvirksemi.

Ynskir tú nærri kunnleika til starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Palla Petersen, tekniska leiðara á tlf. 214863. Umsóknir kunnu sendast til Føroya Shell, Postboks 188, 110 Tórshavn, viðmerk brævbjálvan »Teknikari«. Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 21. februar 2008.

Føroya Shell

**P/F Føroya Shell** er sjálstøðugt felag í samtakinum Shell Group og hevur eitt heimsumfatandi netverk við m.ø. serkunnleika og serfrøðingum at dúva uppá.
14 tangabilar koyra oljuna hvønn dag um allar Føroyar. Shell innflytir oljuna við egnum skipi, og hon verður flutt til oljugoymslurnar, Shell-støðirnar, latin í tangar hjá húsarhaldum, koyrd umborð á skipini o.s.fr.
10 Shell-støðir eru kring landið og átta Shell-avgreiðslur, har fólk kunnu bíleggja olju og fáa fatur á hitatænastuni, um tað er vorðið øskukalt.

Føroya Shell P/F | Vestara Bryggja 10 | Postboks 188 | FO-110 Tórshavn | Tel 34 74 00 | Fax 34 74 90 | shell@shell.fo

## HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?

22 50 00

TÍÐINDAVAKTIN
ALT VIKUSKIFTIÐ




Vikuskiftisvaktin hjá

SOSIALINUM & PORTALINUM

er at hitta alt vikuskiftið á

**TELEFON 22 50 00**

Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum

VIVA

Almanna- og Heilsumálaráðið

## Almenn móttøka

í sambandi við at Hans Pauli Strøm hevur tikið við sum landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum á øðrum sinni, verður almenn móttøka

**hósdagin 14. februar kl. 15:00–16:30**

í Almanna- og heilsumálaráðnum, Eirargarði 2, Tórshavn.

EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN • TELEFON 30 40 50 · TELEFAX 35 40 45 • E-MAIL: AHS@AHS.FO